# *Bygdaráðsfundur*

## Bygdaráðsfundurin hin 25.02. 2013 kl. 16,00 til 18.45 :

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Bygdaráðssalurin | |
| Hjástødd vóru: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jákup A. Olsen | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo – ref. | X |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 28/2013 Fíggjarmál**

J.nr. 2011-0011-0026

**Málslýsing**

Roknskapurin hjá Bókasavninum fyri 2012 er blivin grannsk. av SPEKT og er sendur kommununi til góðkenningar.

Høvuðstølini í roknskapinum 2012 eru hesi:

**Útreiðslur:**

| | | |
|---|---|---|
| Lønir | 41.990,00 kr. | |
| Húsaútreiðslur | 4.587,50 kr. | |
| Bygdabókasavnið | 88.872,50 kr. | |
| Skúlabókasavnið | 40.267,20 kr. | |
| Aðrar útreiðslur | 23.105,22 kr. | 198.822,59 kr. |
| At flyta til næsta ár | | 59.841,59 kr. |
| | | **258.664,21 kr.** |

**Inntøkur:**

| | | |
|---|---|---|
| Kommunust. | 105.000,00 kr. | |
| Kommunust. STS | 40.264,20 kr. | |
| Hølisviðursk. | 4.587,50 kr. | |
| Landskassast. | 53.074,00 kr. | |
| Yvirskot frá 2011 | 55.738,51 kr. | **258.664,21 kr.** |

Ogn:

| | | |
|---|---|---|
| Bøkur | 1.603.875,00 kr. | |
| Innistandandi | 92.412,38 kr. | **1.696.287,38 kr.** |
| | | |
| Eginogn | | **1.696.287,38 kr.** |

**Tilmæli**

Á fundi 20.02.2013 mælir Fíggjarnevndin til, at góðkenna roknskapin hjá Bókasavninum fyri 2012, soleiðis sum hann er uppsettur.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 29/2013 Vegamál**
J. nr. 2011-0044-0053
**Málslýsing**
Borgarar við Brekkuveg hava sent Nes kommunu skriv dagf. 17.10.2012. Teir heita á Nes kommunu um at gera ferðsluforingar á Brekkuvegnum, og vísa annars á, at á vegnum eru nógv smábørn, sum tey ynskja kunnu vera trygg, eisini um tey eru á Brekkuvegnum. Umframt hetta, eru tað nógv børn, sum ferðast eftir vegin til gongu og á syklu tá tey fara í skúla, ella koma úr skúlanum, ella fara til onnur ítróttarlig tiltøk sum eru í skúlanum. Ferðsluforingarnar skulu vera fyri at tálma ferðsluni á Brekkuvegnum til gagns fyri børnini og til at gera ferðsluna tryggari fram við húsunum.

**Tilmælir**
Á fundi 12.02.2013 staðfestir Tekniska nevnd, at ongin peningur er avsettur fyri 2013 og mælir Tekniska nevnd til, at málið verður tikið upp aftur tá fíggjarætlanin fyri 2014 verður viðgjørd.

Á fundi 20.02.2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 30/2013 Vegamál**
J. nr. 2012-0044-0062
**Málslýsing**
Í skrivi heita borgarar við Heygsveg, innari partur, á Nes kommunu um at gera ferðsluforðingar á vegnum. Víst verður á at øll skúlabørnini, starvsfólkini v.m., í skúlanum ferðast eftir hesum vegin hvønn morgun og síðani gjøgnum allan dagin, so tað er neyðugt, at ferðslutrygdin, fyri børn og vaksin er í hásæti. Frá Toftatúni og inn í Brekkir er Heygsvegur einsrættaður, og tað viðførir, at vit ikki hava ”ferðslukaos” á vegnum um morgunin og tá skúlin er liðugur, men vegurin er smalur og nógv børn eru til gongu ella á sýklu á hesum strekki.

Frá Brekkum og inn til Høganesvegin er ferðsla báðar vegir, so her møtast bilar, og á knútapunktinum Brekkuvegur/Heygsvegur, er eitt sera vandamikið punkt um hjørni á garðinum hjá Jens Erik Rasmussen, bæði

fyri børn til gongu og serliga fyri tey á syklu, so neyðugt er at gera okkurt trygdartiltak á hesum punktinum á vegnum. Tey vísa eisini á at øll ynskini miða eftir at gera trygdina á vegnum fyri børnini og onnur betri og fyri at tálma ferðsluni á vegnum, og á tann hátt fora fyri at ferðsluóhapp henda.

**Tilmælir**
Tekniska nevnd mælir til, at í fyrsta føri verða hóskandi skeltir 30 km. sett upp á Heygsvegnum. meðan kommunan arbeiðir við at finna út av, hvat møguliga kann gerast á hesum vegastrekki, fyri at tálma ferðsluna, vísandi til at ongir pengar eru avsettir til hetta arbeiðið á fíggjarætlanini fyri 2013.

Um ætlanin við bygging av íbúðum fram við Heygsvegi fer í gongd, verður vegastrekkið norður frá vegamótinum Heygsvegur/Brekku-vegur norður til Høganesvegin broytt munandi við gongubreyt v.m.

Á fundi 12.02.2013 staðfestir Tekniska nevnd, at ongin peningur er avsettur fyri 2013 og mælir Tekniska nevnd til, at málið verður tikið upp aftur tá fíggjarætlanina fyri 2014 verður viðgjørd.

Á fundi 20.02.2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 31/2013 Byggimál.**
J. nr. 2011-0042-0296
**Málslýsing**
Í skrivi 14.11.2012 heitir borgari á Nes kommunu um at gera wc-rúm, í tí rúminum sum var gjørt til tað sama í norðurendanum á verandi egningaskúrum, bæði til tey fólkini sum arbeiða við línu og øðrum í egningaskúrunum og onnur sum hava sítt dagliga virksemi við bátar v.m. í Oyrahavnini, tí har er onki WC. Kommunan hevur haft ætlanir um eitt ferðafólka wc niðan fyri landsvegin inni í Oyrunum í fleiri ár.

**Tilmælir**
Á fundi 12.02.2013 staðfestir Tekniska nevnd, at ongin peningur er avsettur, og mælir Teknisa nevnd til, at málið verður tikið upp aftur tá fíggjarætlanin fyri 2014 verður viðgjørd.

At Tekniska deild ger eitt uppskot um, at fríðka um inni í Oyrinum og vísa á hvussu økið kann koma at síggja út og fyri møguliga at finna eina loysn til alment WC- á hesum økinum.

Á fundi 20.02.2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 32/2013 Vegamál**
J. nr. 2011-0044-0039
**Málslýsing**
Borgari í Nes kommunu heitir á kommununa at gera gøtuna frá Heygsvegnum og niðan á Hamar í 2013, vísandi til at hetta er ein aldargomul gøta, sum var brúkt av búsetingin upp á Hamri, og til bólið og rættina, sum festið inni á Regni hevði uppi á Hamri.
Víst verður á at peningur er avsettur til gøtur í fíggjarárinum sum kemur.

**Tilmælir**
Á fundi 12.02.2013 mælir Tekniska nevnd til, at hendan gøta verður gjørd í 2013, og at gøtan verður gjørd av arbeiðsfólkinum hjá kommununi.

Á fundi 20.02.2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at peningurin verður tikin av konto 1523, viðlíkahald gøtur.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 33/2013 Vegamál**
J.nr. 2009-0044-0017
**Málslýsing**
Fyri at betra um ferðslutrygdina er áheitan komin frá skúlanum um ferðsluforðing við skúlaøki fyri at minka um ferðina hjá bilunum, møguliga við einari fersluforðing og at ongin parkering verður loyvd framvið skúlagarðinum og fimleikarahøllini í skúlatíð.

**Tilmælir**
Á fundi 12.02.2013 mælir Tekniska nevnd til, at betra verður um ferðslutrygdina við skúlan. At gjørd verður ein ferðsluforðing við Piddasa hús og hvít strípa verður málað, sum fótgangarateigur, frá skúlanum og inn til garðin í Brekkunum.

At skelti verður sett upp um, at ongin parkering er loyvd framvið skúlagarðinum og fimleikarahøllini frá kl. 08.00 til kl. 17.00 vanligar dagar.

Á fundi 20.02.2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd og at peningurin til ferðsluforðingina verður tikin av konto 1529, ferðsluforðingar, meðan peningur fyri uppmerkingingin verður tikin av konto 1521, viðlíkahald bygdarvegir.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 34/2013 Vegamál.**
J. nr. 2011-0044-0051.
**Málslýsing**
Í skrivi dagf. 13.01.2013 mælir Súni í Hjøllum til, at kommunan endaliga fremur samtyktina um ferðsluforingar á Regnavegnum og ger eina foring aftur á leið við húsini uppi á Regni, soleiðis sum upprunaliga ætlanin var.

**Tilmælir**
Á fundi 12.02.2013 vísti Tekniska nevnd á, at samb. samtykt so manglar ein ferðsluforðing á Regnavegnum, og mælir tí til at um peningur er eftir, eftir at ferðsluforingin við Piddasa hús er gjørd, verður restuphæddin brúkt til ferðsluforðing á Regnavegnum.

Á fundi 20.02.2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 35/2013 Vegamál.**
J. nr. 2011-0044-0039.
**Málslýsing**
Í skrivi dagf. 13.01.2013 mælir Súni í Hjøllum til:

1. At gøtan í Geilini og niðan í Nýggjagerð verður hampa og sett í nýtiligan stand.

2. At kommunan útvegar og setur upp hóskandi ljós á gøtuna, frá Hjallavegnum á Sýnini og niðan til Høganesvegin, ella sum vit vanliga siga, niðan til Fold.

**Tilmælir**

À fundi 12.02.2013 mælir Tekniska nevnd til:

1. At gøtan í Geilini og niðan í Nýggjagerð er vanligt viðlíkahald og skal hetta arbeiði gerast í 2013.
2. Ikki at taka undir við, at ljós verða sett upp.

Tekniska nevnd mælir til, at málið um ljós á gøtuna niðan til Fold verður tikið upp aftur, tá fíggjarætlanina fyri 2014 verður viðgjørd.

À fundi 20.02.2012 tekur Fíggjarnevndin undir við at gera gøtuna niðan í Nýggjagerð og at peningurin verður tikin av konto 1523, viðlíkahald gøtur.

**Avgerð**

Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 36/2013 Havnamál**

J. nr. 2009-0046-0032

**Málslýsing**

Kajfútin søkur um loyvi til at seta 10 el-málarar upp afturat teimum 10 sum longu eru, inni í Oyrahavnini.

Leystliga mett kostar ein ein el-málari kr. 1.200,- við øllum.

Kostnaðurin av teimum 10 el-málarunum, ið eru uppsettir inni í Oyrunum er kr. 13.700,00

**Tilmælir**

Á fundi 12.02.2013 mælir Tekniska nevnd til, at kajfútin fær loyvi til, at seta 10 el-málarar upp afturtrat inni í Oyrunum

Á fundi 20.02.2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd og at peningurin verður tikin av konto 1619, viðlíkahald ljós havnaøkið.

**Avgerð**

Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 37/2013 Jarðarmál**

J.nr. 2012-0024-0014

**Málslýsing**

Eysturoyar-MC søkir um, at fáa minkað um leigaða økið norðan fyri bygningin á matr. nr. 435k fyri at minka um leigu útreiðslurnar.

Eysturoyar-MC heldur ikki at tørvur er hjá teimum til hetta økið. Økið verður brúkt av teimum sum koma til Undirhúsið og Handilin hjá Pidda.

**Tilmælir**

Á fundi 12.02.2013 mælir Tekniska nevnd til, at minka um leigaða økið hjá Eysturoyar-MC, norðanfyri bygningin á matr. Nr. 435k, við 20 fermetrum.

Á fundi 20.02.2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

**Avgerð**

Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 38/2013 Umhvørvismál**

J.nr. 2013-0014-0005

**Málslýsing**

Trygdarskipan fyri starvsfólkið hjá Nes Kommunu

Arbeiðsgevarin hevur eftir arbeiðsumhvørvislógin evstu ábyrgd fyri trygdini og at trygdararbeiði er væl skipað.

Nes Kommuna hevur onga trygdarskipan, men eiga vit at fara undir at gera tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa eina slíka skipan. Her kundi borgarstjórin saman við umsitingini fingið heimild til at arbeiða víðari við hesum.

**Tilmælir**

Á fundi 12.02.2013 mælir Tekniska nevnd til, at borgarstjórin saman við umsitingini fær heimild til, at arbeiða víðari við Trygdarskipanini hjá Nes Kommunu

Á fundi 20.02.2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

**Avgerð**

Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 39/2013 Havnamál**
J.nr. 2013-0046-0058
**Málslýsing**
Havnameistarin metir at kanttræ/skinnari á molanum við ferjuleguna er at kalla rotin, og mælir til at hesin verður umvældur/skiftur. Havnameistarin hevur fingið 2 tilboð hesum viðv. á kr. 94.350 frá Articon og kr. 139.200 frá J K Petersen.

**Tilmælir**
Í fíggjarætlanini fyri 2013 eru kr. 110.000 avsettar til umvæling og viðlíkahald, herav kr. 30.000 til løn og kr. 80.000 til umvælingar.

Á fundi 12.02.2013 mælir Tekniska nevnd til, at arbeiði verður gjørt. At skinnarin, ið brúktur verður hevur "sveisiklattar" og at tikið verður av tí lægra tilboðnum.

Á fundi 20.02.2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd og at kr. 80.000,00 verða tiknar av konto 1610, umsiting av bryggju og at tað sum restar í verður tikið av vegagerð við Fiskamarknaðin.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 40/2013 Havnamál**
J.nr. 2012-0046-0055
**Málslýsing**
Í 2012 bleiv avgerð tikin um at gerða ein 20 m kajkant við saltsøluna. Arbeiði bleiv boði út, og skuldi gerðast liðugt í 2012. Kostnaður gott 2,0 mió. Kr. Sum kunnugt er arbeiði ikki liðugt enn og kemur ikki at ávirka roknskapin fyri 2012 stórvegis. Í fíggjarætlanini fyri 2013 er einki tikið við til íløgu av Kajini inni við Rætt, men játtanin frá 2012 er heldur ikki brúkt, so tekniskt skal ein eykajáttan fyri 2013 fyriliggja. Harafturat kemur installering av ljósmastrum v.m.

Fyrispurningur er komin frá J&K Petersen um teir kunna bíða við, at arbeiða víðari við kajkantin inni á Rætt til 01. april. Hetta grunda teir á, at tá skuldi vandin verið minni fyri uppgangi.

**Tilmælir**
Á fundi 12.02.2013 mælir Tekniska nevnd til, at J&K Petersen fær loyvi til at bíða við, at byrja uppá kajkantin inni á Rætt, til 01. apríl 2013.

Á fundi 20.02.2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 41/2013 Umhvørvismál**
J.nr. 2010/0049-0008
**Málslýsing**
Fyrispurningur er komin frá Runavíkar kommunu um hvat vit víðari gera við moldgoymsluna á Skorhæddini.

Runavíkar kommuna hevur avsett kr. 600.000,- fyri 2013. Nes kommuna hevur ikki avsett nakran pening fyri 2013.

**Tilmælir**
Á fundi 12.02.2013 staðfestir Tekniska nevnd, at ongin peningur er avsettur í 2013 og staðfest er, at ongin íløga verður gjørd av Nes kommunu í 2013, men at fara í samráð við Runavíkar kommunu, fyri at finna útav um økið kann brúkast í 2013 og annars hvussu økið kann skipast.

At Tekniska nevnd og tekniska deild fara at hyggja uppá hvussu gjørt verður hjá øðrum kommunum.

Á fundi 20.02.2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 42/2013 Trivnaðarmál.**
J.nr. 2009-0031-0057
**Málslýsing**
Umboð fyr borgarar, ið samlast á Vesturskin søkja um stuðul til koyring vegna tey, sum ongan fart hava.

Tey møtast á Vesturskin 3 dagar um vikuna í 8 mánaðar.

Koyritænastan bjóðar sær til at koyra fyri kr. 100,- um dagin, tað verður kr. 1.200,- um mánaðin

**Tilmælir**
Á fundi 12.02.2013 mælir Trivnaðarnevndin til, at játta stuðul fram til summarfríðtíðina, sum eina roynd.

Á fundi 20.02.2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini og at peningurin verður tikin av konto 1205, dagtilhaldið.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru eimælt samtykt.

Niclas Davidsen og Súnfríð Jacobsen vóru úti meðan málið var viðgjørt**.**

**Mál nr. 43/2013 Barnaverndarmál**
J.nr. 2010-0031-0096
**Málslýsing**
Símin í Túni, ið er limur í barnaverndarnevndini ynskir at verða loystur úr starvinum orsaka av sínum arbeiði.

Eftir áheitan hevur Atla F. Johansen, lærari, játtað at gerast nýggjur limur í Barnaverndarnevndini.

**Tilmælir**
Á fundi 12.02.2013 mælir Trivnaðarnevndin til, at Atli F. Johansen verður nýggjur limur í Barnaverndarnevndini.

Á fundi 20.02.2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 44/2013 Fyrisitingarmál:**
J. nr. 2013-0004-0016
**Málslýsing**
Kommunustyrisskipanin fyri bygdaráðið skal hava tvær viðgerðir. Fyrsta viðgerð var á bygdarráðsfundi 28.01.2013.

Í sambandi við, at bygdráðið hevur viðtikið at skipa eina nýggja nevnd “Vinnunevnd”, afturat teimum verandi, til fyrisiting av kommunalum viðurskiftum, er neyðugt at dagføra kommunustýrisskipanina samsvarandi.

# *Bygdaráðsfundur*

Formansskapurin hevur fingið til uppgávu at gera uppskot, og í uppskotinum verður ásett, at vinnunevndin ger tilmælið til bygdaráðið í teimum kommunalum uppgávunum á tí vinnuliga økinum innan:

- Vinnustrategi
- Vinnunýskipan
- Fiskivinnu
- Havnaøki/Havnamál.
- Handils- og tænastuvinnu
- Ferðavinnu
- Oljuvinnu
- Matvørulógina
- Marknaðarføring
- Nýggjum bústaðarmøguleikum
- Alternativum ella varandi orkukeldum

Galdandi kommunufyriskipan er frá jan. 2005, og er ikki dagførd síðani. Uppkotið fevnir tí eisini um dagføringar, soleiðis at kommunustyrissskipanin er samsvarandi galdandi kommunustýrislóg og galdandi kunngerð um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógini.

Uppskotið til broyttu kommunufyriskipan hevur verið til ummælis í nevndunum.

**Tilmælir**
Uppskotið til broyttu kommunufyriskipanina hevur verið til ummælis í nevndunum. Nevndirnar hava ikki viðmerkingar til uppskotið til nýggja kommunustýrisskipan fyri Nes kommunu, og mæla til at samtykkja uppskotið.

**Avgerð**
Tilmælini frá formansskapinum og nevndunum vóru einmælt samtykt við 2. viðgerð.

**<u>Mál nr. 45/2013 Fyrisitingarmál :</u>**
<u>J. nr. 2013-0004-0017</u>
**Málslýsing**
Fundarskipan fyri bygdaráðið skal hava tvær viðgerðir.  Fyrsta viðgerð var á bygdarráðsfundi  28.01.2013.

Núverandi fundarskipan er frá jan. 2005. Formanskapurin hevur fingið til uppgávu at kanna eftir, at um tað er neyðugt at dagføra fundarskipanina og at koma við uppskoti um broytingar, um tað er neyðugt. Formansskapurin metir, at verandi fundarskipan er ílagi við nøkrum heilt fáum undantøkum, t.d. við

kunngerðing, lýsing og fundarboðum, og hevur gjørt uppskot til broytingar í hesum sambandi.

**Tilmælir**
Uppskotið til broytta fundarskipan hevur verið til ummælis í nevndunum. Nevndirnar hava ikki viðmerkingar til uppskotið til broyttu fundarskipanin fyri Nes kommunu, og mæla til at samtykkja uppskotið.

**Avgerð**
Tilmælini frá formansskapinum og nevndunum vóru einmælt samtykt við 2. viðgerð.

**Fundarbókin lisin upp.**

**Fundur lokin kl. 18.45**

**Kunning**

Borgarstjórin kunnaði um mál sum eru í nevnd, men sum ikki eru klár til støðutakan.

Borgarstjórin kunnaði bygdaráðslimirnar um ymisk kommunal viðurskiftir.